TILTØK

Frelsunarherurin
Sunnudagin kl. 11 Møti, Palli Petersen talar. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Børn kl. 17.30, kl. 18 Møti, S. J. Joensen talar. Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.
Børn hvønn mikudag kl. 15.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bibliugransking. Evni: Vinningur og tap. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

»Tíð til Gud«
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Drekkamuður aftaná. Høvi er at tekna seg til legutúrin á Eiði 8. til 10. februar. Verið hjartaliga vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – ímeðan verða smábørn ansaði í lítlasali. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti – bæði vaksin og børn luttaka við boðskapi til vaksin og børn. Aftaná verður náttúrði.
Mánadagin kl. 19 Hugnaløta teirra ungu.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 22 hámessa í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Børn og kl. 18 Møti við Magnus Simonsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Scott Wilson, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Scott Wilson.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Missiónsvikan heldur fram alla vikuna:
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/ Regin Høgnesen, Manskórið í húsinum syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/Regin Høgnesen, Manskórið av Sandi syngur.
Sunnudagin kl. 14 Familjumøti/Sunnudagsskúli, Gentukórið syngur, kl. 18 Møti v/ Regin Høgnesen, Meinigheitskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.
Bønarløta er hvørt kvøld ein tíma áðrenn møti byrjar.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Aglow í Kvívík
Aglow møti verður í Glæmuni í Kvívík, leygarkvøldið 2. feb. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Elim, Søldafjørður
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti, Elsa og Poul Johan Djurhuus luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nes prestagjald
Várkonfirmatiónin í Nes prestagjaldi verður í Gøtu kirkju sunnudagin 7. apríl. Ætlanin er at lesa við øllum konfirmantunum nú í vár; so kunnu tey sjálvi velja at verða konfirmerað í vár ella bíða til heystar. Heystkonfirmatiónin verður ætlandi hildin í Fríðrikskirkjuni sunnudagin 6. oktober. Ætlanin er at Gøtubørn ganga til í Gøtu kirkju (fyrstu ferð mánamorgun 18. feb. kl. 8.15 og Tofta-børn í Fríðrikskirkjuni (fyrstu ferð týsmorgun 19. feb, kl. 8.15). Í sambandi við konfirmatiónina eru foreldur/avvarðandi vælkomin til kunnandi foreldrafundir í Gøtu kirkju týskvøldið 5. feb. kl. 20 og í Fríðrikskirkjuni hóskvøldið 7. feb. kl. 20.

Losjan, Gøta
Hjartaliga vælkomin til ein tíma við bibliuni sunnudagin kl. 19.30 v/ Karen J. Lund og Inger J. Hildershavn.

B68 húsið
Evangeliskt møti verður í B68 húsinum á Svangaskarði leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19.

Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jóhan Petur Jóhannesen.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Soli Deo Gloria
Mikukvøldið kl. 20 Kvinnurnar møtast.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 19 Alphaskeið, kl. 20.30 Opið Hús – ung vitna.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Pól Thomsen talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Hans Kristian Jóhannesen, ungdómsráðgeva og Jógvan og Martin. Evni: Frelsuvissan. Drekka verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Børn og Lovsangur, kl. 18 Møti.
Missiónsvikan verður í døgunum 13.-17. feb. Í samband við missiónsvikuna verða bønarmøti hvørt kvøld kl. 4. feb. kl. 20.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Fríggjadagin kl. 20.00 Fundur kl. 22.00 Ungdómsfundur
Leygardagin kl. 20.00 Fundur Talarar: Høgni Johansen og Janus Gunnarsson.
Sangluttøka við ungdómum úr Havn.
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur

Frelsunarherurin, Vágur
Møti saman við Sion í Framtíðini kl. 20 fríggjadagin og leygardagin og sunnudagin kl. 18. Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið, allar kvinnur eru vælkomnar.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við *Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/261516.*

PRÓGV

25. januar fekk Benny Sevdal á Ingeniørskúlanum í Horsens prógv sum maskinverkfrøðingur við sveising sum sergrein.

70 ÁR

Í dag, 1. feb. fyllir Osla Heimustovu, Klaksvík, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Jóannesi og Juliannu, undir Hæddini 4.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 28. januar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
Týsdagin 29. januar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Óli Vang. **Øll eru hjartaliga vælkomin**
kl. 15 Arbeiðið á misjónsmarkini, Elsa Jacobsen
Mikudagin 30. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur
Hósdagin 31. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 1. februar
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Steen 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fríggjadagin kl. 20-21 og 22.30-23.30 Fundur.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundur í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgíro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Verkfrøðingur
til Pf. Vágatunnilin

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projekterings- og byggileiðslu og aðrar uppgávur, millum annað í sambandi við Norðoyatunnilin.

Førleikakrøv
Tann rætti umsøkjarin
- er verkfrøðingur ella hevur líknandi útbúgving frá hægri lærustovni
- hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá projekterings- og byggileiðslu
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt mál

Lønar og setanartreytir
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. apríl 2002, ella eftir nærri avtalu. Løn og setanartreytir annars eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350200 ella teldupost drh@vagatunnilin.fo



Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. februar 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu sendast til:

Vágatunnilin p/f
Postboks 1010
110 Tórshavn

VÁGATUNNILIN
Vágatunnilin p/f · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.vagatunnilin.fo

FILMSTEIGURIN

Not another Teen Movie

Júst sum »Scary Movie« lumpaði teenage-gysararnar, er Not Another Teen Movie ein feit parodi upp á teir ótalligu teenagefilmarnar, sum er at síggja í biografum kring heimin. Her hitta vit allar kliché'irnar sum tann smarta, ríka ítróttaridiotin, sum vegna eitt veddumál skla »niðurleggja« ljóastu gentuna í skúlanum, sum sjálvandi vísir seg at vera ein lekkur steik. Sjálvandi eru har allir teir vanligu persónarnir so sum tann feita narrireyvin, tann stuttliga svarta, tann keðiliga heksin, tann ljóshærdi snobburin, tann nækni skiftisstudenturin, tann sjálvupptikna heppikórsleiðarin, tann lítla graða og so sjálvandi nørdurin. Stutt sagt, vit eru á John Hughes High, sum skúlin so rámandi eitur…

Vanilla Sky

Ein kelin rødd vekir hann, inntala á vekjaran. Hann fer út á WC og beinir burtur eitt einkult grátt hár. Hann letur seg í avslappaðu designklæðini, fer í parkeringskjallaran eftir Ferrari'inum og leggur leiðina út á strævnu gøturnar í New York. Hendan morgunin er ikki so nógv lív í gøtunum, tær eru tómar! David er einsamallur í verðini – og so vaknar hann!
Psykologurin heldur dreymin hjá David vera løgnan. Men hvat skal man eisini halda um ein mann, hvørs lív er ein livandi dreymur – ein rættur playboy við einum vælevdnaðum blaðimperiumi í síni makt og við einum umgangskredsi við teimum ríku, teimum valdsmiklu og teimum vøkru – ikki minst kvinnurnar, sum hann velur sær eftir behag…
Hví situr hann nú í einum fongsli og tosar við psykologin, hvørs evaluering kann vera altavgerandi fyri dómi hansara? Bert David kennir svarið. Fortel, sigur psykologurin – og tað ger hann!

Frumsýning

Fríggjadagin	01.02.	kl. 19⁰⁰	Fríggjadagin	01.02.	kl. 21⁰⁰
Leygardagin	02.02.	kl. 19⁰⁰	Leygardagin	02.02.	kl. 21⁰⁰
Sunnudagin	03.02.	kl. 18³⁰	Sunnudagin	03.02.	kl. 20³⁰

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆



Frumsýning

Fríggjadagin	01.02.	kl. 20⁰⁰	Fríggjadagin	01.02.	kl. 23¹⁵
Leygardagin	02.02.	kl. 20⁰⁰	Leygardagin	02.02.	kl. 23¹⁵
Sunnudagin	03.02.	kl. 19³⁰	Sunnudagin	03.02.	kl. 22³⁰

Fríggjadagin	01.02.	kl. 22⁴⁵	Leygardagin	02.02.	kl. 22⁴⁵
Sunnudagin	03.02.	kl. 22¹⁵			

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Fríggjadagin 08.02.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu